Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



*Undir framløguni av valskránni hjá Javnaðarflokkinum 29. desember í fjør kom undan kavi, at Javnaðarflokkurin ikki ætlaði at seta fólk í miðfyrisitingini til hús. Mikudagin vóru 16 fólk søgd úr starvi í miðfyrisitingini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*


## Búskaparfrøðingur, Alifrøðingur, Verkfrøðingur

**P/F Fiskaaling søkir stjóra**

Fiskaaling miðar eftir at ganga á odda í granskingar- og menningarvirksemi í alivinnuni í Føroyum og at byggja upp eina granskingarstøð á altjóða støði. Felagið skal skapa karmar um hetta virksemið og skapa møguleikar fyri at fáa eina tilgongd av væl skikkaðum granskarum, sum kunnu útbyggja og víðka vitanarstøðið undir fiskaaling í Føroyum. Felagið skal í størri mun enn nú samstarva við granskingarumhvørvið í Føroyum, í grannalondum okkara og taka lut í felags verkætlanum.

At miðla vitan og úrslit frá granskingar- og menningarvirksemi-num til vinnuna og almenningin og at veita ráðgeving koma eisini at verða týðandi arbeiðsuppgávur hjá Fiskaaling.

Fiskaaling hevur higartil nýtt nógva orku innan kynbótaarbeiði við laksum og sílum, herundir at framleiða laksarogn og sílarogn. Arbeitt verður við at umskipa kynbótaarbeiðið, og ætlanin er at leggja framleiðsluna í eina sjálvstøðuga eind.

**Krøv og ynski til umsøkjaran**

- tú ert búskapar-, ali- ella verkfrøðingur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni
- tú dugir at samskifta á enskum
- tú ert nýhugsin og smidlig/-ur
- tú hevur kunnleika til gransking og vinnulív

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu og í mun til útbúgving og starvsroyndir. Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Fiskaaling við Áir. Meira fæst at vita við at venda sær til Janet Fríðu Johannesen, nevndarformaður tel 319685.

**Umsókn**

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

KPMG

Staravegur 17

Postsmoga 3258,

FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 27. september 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**P/F Fiskaaling**
**Við Áir**


# Javnaðarflokkurin brýtur vallyftið

**Aðalráðini skulu skerjast í tali, men eingin starvsfólk skulu sendast heim. Hesum boðaði Javnaðarflokkurin frá undir valstríðnum. Mikudagin kom undan kavi, at 16 fólk missa starvið mikudagin**

SKERJING Í MIÐFYRISITINGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Framtíðin hjá miðfyrisitingini var eitt av høvuðsevnunum hjá Javnaðarflokkinum undir valstríðnum í januar mánaði. Undir framløguni av valskrá Javnaðarfloksins og í valsending boðaði flokkurin frá, at hann ynskti at skerja aðalráðini, og samstundis segði Javnaðarflokkurin, at flokkurin ætlaði ikki at senda nøkur starvsfólk heim úr miðfyrisitingini.

Mikudagin vórðu 16 fólk úr miðfyrisitingini send heim til hús. Grundgevingin fyri hópuppsagnunum hjá ABC-samgonguni er, at tað er neyðugt at fremja ein lønarniðurskurð á 10 % í almennu fyrisitingini.

Javnaðarflokkurin gongur ímóti tí boðskapinum, sum flokkurin hevði í valstríðnum undan løgtingsvalinum 20. januar í ár.

### Bert eitt valevni

Løgmaður Jóannes Eidesgaard váttar, at eitt av valevnum Javnaðarfloksins undir framløguni av valskránni segði, at ætlanin var ikki at senda starvsfólk í miðfyrisitingini til hús, hóast Javnaðarflokkurin vildi skerja aðalráðini.

– Eg haldi ikki hatta var boðskapurin hjá Javnaðarflokkinum, men heldur var talan um ein útsøgn hjá einum av valevnum okkara. Viðkomandi persónur fekk eisini at vita, at Javnaðarflokkurin ikki stóð við hansara útsøgn eftir tilburðin, greiðir løgmaður frá.

*Skal veljarin ikki trúgva valevnunum hjá flokkinum?*

Jú jú, men støðan var einaferð hon, at flokkurin ikki stóð inni fyri útsøgnini, og tað fekk hann sum sagt eisini at vita, svarar løgmaður.

Jóannes Eidesgaard vil ikki siga, hvat valevni talan er um, men løgmaður sipar óivað til Kristian Magnussen, sum í valsending í SvF segði, at skerjingin ikki fór at kosta arbeiðspláss í fyrisitingini.

Undir framløguni av sjálvari valskránni nam Hans Pauli Strøm eisini við spurningin.

– Jú tað er rætt, at eg úttalaði meg um spurningin. Eg minnist, at Jóannes (Eidesgaard, blðm) varð fyrst spurdur um skerjingin av aðalráðum merkti at neyðugt var við at senda fólk heim úr fyrisitingini, og síðan tóku eg og Bergur (Dam, blðm,) yvir. Eg greiddi frá, at skerjingarnar í aðalráðunum ikki neyðturviliga skuldi kosta arbeiðspláss í miðfyrisitingini, sigur Hans Paula Strøm.

### Politiski veruleikin øðrvísi

Bæði Hans Pauli Strøm og løgmaður siga, at tað er ein sannroynd, at stórur munur er á politiska veruleikanum 29. desember í fjør og nú góðar níggju mánaðir seinni, og tí samsvarar vallyftini og avgerðin mikudagin ikki.

– Vit eru noyddir at fyrihalda okkum til búskaparliga veruleikan í dag, og hann sigur, at vit øll eru noydd at taka eitt tak. Vit kunnu ikki yvirliva politiskt við at skerja á øllum øðrum økjum uttan at hyggja okkara egnu fyrisiting, og tí eru hesi stig tikin, vísir Hans Pauli Strøm á.



# Neyðugt við enn fleiri sparingum fíggjarlógini

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum váttar, at fleiri sparingar skulu til hjá tí almenna**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað slepst ikki undan at almennir stovnar av ymsum slagi mugu seta sparingar í verk næsta ár. Men Bárður Nielsen sigur, at tilsamans fer tað almenn at verða arbeiðsgevari hjá fleiri fólkum næsta ár, enn í ár*

Tær 10 prosentini, sum miðfyrisitingin hjá landsstýrinum hevur fingið boð um at spara næsta ár, verða ikki tær einastu sparingarnar, sum tað verður neyðugt at gera á fíggjarlógini fyri næsta ár

– Tað verður nevniliga neyðugt við enn fleiri sparingum á fíggjarlógini

Tað váttar Bárður Nielsen, landsstýrismaður fyri Sosialinum.

Á minussíðuni hjá landskassanum telur tað heilt nógv hjá landskassanum at tað er ein sannroynd, at lønirnar fara at hækka 4% næsta ár.

Tað telur rættiliga nógv hjá landskassanum, tí nógv tann størsti parturin av útreiðslunum hjá landskassanum, eru lønir av ymsum slagi.

Hinvegin er støðan hjá landskassanum tann, at næsta ár fara inntøkurnar at vera áleið tær somu, sum tær eru í ár.

Samstundis miðjar landsstýrið eftir, at næst ár skal hallið á fíggjarlógini ikki vera størri enn í ár, ella góðar 200 milliónir.

Men samstundis hevur landsstýrið boðað frá, at tað ætlar at føra ein arbeiðsskapandi fíggjarpolitikk og at brúka nógvan pening til útbyggingar fyri at hjálpa til at halda hjólunum í gongd og at skapa arbeiði. Tað er eisini ein veruleiki, at næsta ár verða fleiri sambýli liðug, sum fara at krevja nógv starvsfólk.

Tey 10 prosentini, sum miðfyrisitingin skal spara, gevur bara sey milliónir og tað er bara ein lítil dropi í havinum av almennum útreiðslum.

Sostatt slepst ikki undan, at seta enn fleiri sparingar í verk fyri at fáa roknistykkið at ganga upp.

Sosialurin veit eisini frá álítandi keldum, at stovnar undir landsstýrinum fara í næstum at fáa boð um at spara nøkur prosent í rakstrinum.

Keldur hjá blaðnum vilja vera við, at í næstum fara almennir stovnar at fáa boð um at spara 10% í rakstrinum.

Sostatt er tað greitt, at tað slepst ikki undan enn fleiri uppsagnum á ymsum stovnum.

Men kortini eru bæði heilsuverkið og skúlaverkið undantikin hesum sparitiltøkum, tí tað leggur samgongan dent á at varðveita. Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, váttar at tað verður neyðugt við fleiri sparingum.

Men hann vil framvegis ikki inn á smálutir í fíggjarlógini og tí vil hann hvørki vátta ella avsanna tíðindini um tey 10 prosentini.

Og hann leggur framvegis dent á, at tilsamans fer tað almenna at hava brúk fyri fleiri hondum til arbeiðis næsta ár, enn tað hevur í dag, tí at landsstýrið fer at føra ein arbeiðsskapandi fíggjarpolitikk, eitt nú við ymsum útbyggingum, sum framt at áðurnevndu sambýli fara at krevja nógv starvsfólk.

Landsstýrismaðurin sigur politiska viðgerðin av fíggjarlógini er at kalla liðug.

Og hann heldur, at landsstýrismenn hava dugað væl at ásanna búskaparligu støðuna og tí hava ynskini og krøvini ikki verið so stór, sum tey onkuntíð hava verið.

Annars hevur hann ongar viðmerkingar, fyrrenn fíggjarlógin verður løgd fram.

# Næmingar í Suðuroy farnir at ressast

**Studentaskúlanæmingar í Suðuroy eru farnir at savna inn undirskriftir fyri at fáa skúlan fluttan til Hovs**

MIÐNÁMSSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ingibjørg Thomsen, vm og Sunniva Mortensen, sum ganga í miðnámsskúla í Suðuroy, savna inn undirskriftir fyri at fáa býráðið í Vági at góðtaka, at miðnámsskúlin verður fluttur til Hovs*

Miðnámsskúlin í Suðuroy eigur at verða fluttur til Hovs.

Tað halda nógvir næmingarnir, sum ganga í skúlanum.

Í sambandi við ætlanina at flyta miðnámsskúlan úr Vági til Hovs og at byggja røktarheim í Vági ístaðin, taka nú eisini næmingar á skúlanum til orðanna.

Tær báðar, Ingibjørg Thomsen úr Sandvík og Sunniva Mortensen av Tvøroyri hava tikið stig til at savna inn undirskriftir í Suðuroynni við kravi um, at skúlin verður fluttur til Hovs, og at røktarheim verður bygt í Vági, soleiðis sum landsstýrið ætlaði.

Tær báðar, sum ganga í 1. a í miðnámsskúlanum, halda, at tað er ikki meiri enn rímiligt, at næmingarnir royna at gera sína ávirkan galdandi.

Tì savna tær inn undirskriftir um alla oynna og ætlanin er so at handa borgarstjóranum í Vági undirskriftirnar og kanska verða tær eisini sendar í landsstýrið.

Og tær siga, at tær hava fingið rættiliga stóra undirtøku og at tað eru heilt nógv fólk, sum hava skrivað undir.

Tær báðar halda, at tað er burturvið ikki at taka av tilboðnum frá landsstýrinum.

Og tær siga, at hetta er vanligi hugburðurin hjá næmingunum á skúlanum.

– Nógv teir flestu næmingarnir vilja hava skúlan í Hovi, tí so er hann mitt í oynni og tað verður líka langt hjá øllum at ferðast til og úr skúla.

Einasti fyrimunur við at hava broyta ætlanina nú, er at tað kostar eitt sindur at broyta projektið, men tað eigur kortini at verða gjørt, tí í longdini eru fyrimunirnir nógv størri.

– Annars er ongin fyrimunur við at hava skúlan í Vági.

– Samstundis hevði tørvurin á røktarheimsplássum í Suðuroy verðið gingin á møti, samstundis sum tað hevði skapt fleiri arbeiðspláss.

Tey vísa á, at ungdómurin er framtíðin og tí eiga vit at vilja ungdóminum tað besta, og tað er at flyta skúlan til Hovs.

Og tær leggja onki í, um hetta fer at seinka skúlanum eitt ella tvey ár.

– Tað hevur verið tosað um nýggjan miðnámsskúla í Suðuroy í 25-30 ár. Hann er útsettur fleiri ferðir, so um hann verður útsettur eitt ella tvey ár afturat fyri at fáa tað bestu loysnina, ger einki, halda Ingibjørg Thomsen og Sunniva Mortensen.

# Lagnan hjá nýggja Smyrli framvegis óviss

**Arbeiðið upp á nýggja Smyril varð tikið uppaftur í gjár, men boðað er frá verkfalli aftur longu í næstu viku**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er framvegis ógvuliga óvist, nær nýggi Smyril verður liðgur.

Men tað er heilt greitt, at tað verður ikki í ár.

Tað hevur elvt til stórar trupulleikar, at ES fyrr í ár álegði IZAR skipasmiðju-samtakinum, sum smíðar nýggja Smyril, at betala spanska landskassanum ovurhonds stórar upphæddir aftur, sum IZAR hevði fingið í ólógligum stuðuli.

Hetta hevur ført til stórar rembingar og ongin avgerð er tikin um, hvat skal henda.

Men IZAR samtakið eigur fleiri skipasmiðjur og tað hevur ligið í kortunum, at nakrar av skipasmiðjunum hjá samtakinum, skulu latast aftur.

Tað hevur eisini ligið í kortunum, at skipasmiðjan í San Fernando, har Smyril verður smíðaður, skal lata aftur.

Og hetta hevur fingið arbeiðsfólkið at ressast við og at seta tiltøk í verk. Sostatt varð arbeiðið upp á nýggja Smyril niðurlagt herfyri og ongin er so mikið sum sloppin inn á Skipasmiðjuna, heldur ikki tey, sum skuu hava eftirlit við byggingini av nýggja Smyrli, tí blokadur hava verið settar í verk.

Men hósdagin sluppu umboðini hjá Strandferðsluni inn aftur á Skipasmiðjuni.

Mikukvøldið varð fundur á Skipasmiðjuni og tað førdi við sær, at arbeið varð tikið upp aftur klokkan átta í gjáramorgunin.

Arbeiðsfólkið skuldi aftur møta til arbeiðis mánadagin.

Men longu týsdagin er aftur boðað frá aðalverkfalli á skipasmiðjuni og mikudagin verður eisini skipað fyri tiltøkum.

### Sáttmálin verður hildin

Sostatt er tað ongin, sum hevur greiði á, hvussu verður við nýggja Smyrli. Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur kortini, at sáttmálin um nýggja Smyril er ikki við hesa ávísu skipasmiðjuna, men við IZAR samtakið sum heild.

Og IZAR hevur váttað fyri Strandferðsluni, at sáttmálin verður hildin.

Samsundis varð avtalað, at nýggi Smyril skuldi vera liðugur 31. oktober.

Verður hann seinkaður meiri enn enn ein mánað, kemur IZAR undir dagbøtur, sum eru 100.000 krónur um dagin í fyrstuni. Men meiri hann verður seinkaður, størri verða bøturnar

– Hetta er avgjørt nakað, sum leggur hart trýst á leiðsluna í IZAR, sigur Kristian Davidsen.

Enn er tað tó ikki komið hartil, at støða er tikin til, antin smyril skal sleipast onkra aðrastøni at verða gjørdur liðugur.

Sostatt er tað enn ikki greitt, hvussu nógv, nýggi Smyril verður seinkaður. Kortini hevur skipasmiðjan boðað frá, at ætlanin er at royna ymsar skipanir umborð í skipunum í desember.

Tað tekur helst eina tíð at royna tær, so tað er í øllum førum greitt, at tað verður ikki hesumegin ársskiftið, at nýggi Smyril verður liðugur.

Men alt hetta veldst sjálvandi um, nær arbeiðið verður tikið uppaftur, so at viðurskiftini fáast í rættlag, sigur Kristian Davidsen.



*Nýggi Smyril var akkurát málaður fyrstu ferð, tá ið arbeiðið varð lagt stilt.Ongin veit enn, nær hann verður liðugur*